# Angela og Hannibal í Føroyahúsinum



**Sunnudagin vitjar Føroya kendasta gyklara par, Angela og Hannibal, í Føroyahúsinum í Keypmannahavn. Angela og Hannibal hava merkt, at stórur áhugi eisini er fyri teimum millum yngri føroyingar í Danmark**

GYKL
*Dagfinn Olsen*
dagfinn@sosialurin.fo

Sunnudagin klokkan 15 fara Angela og Hannibal at vitja í Føroyahúsinum í Keypmannahavn. Hvørt mansbarn í Føroyum kennir tey bæði, ið eru kend frá sjónvarpi og pallframførslum kring landið. Nú hava tey merkt, at áhugi eisini er fyri teimum millum yngri føroyingar í Danmark. Tí fara tey nú at framføra í Føroyahúsinum.

– Hetta byrjaði við, at ein dani, ið hevði tilknýti til SMS, sá okkum, og tí vildi hava okkum til Danmarkar at framføra, sigur Angela.

– Vit búgva nú bæði í Danmark. Trølla Pætur og Omman hava roynt seg í Danmark, og tá vit nú eru her, so hugsaðu vit, at vit kunnu eisini royna okkum her niðri, sigur Angela.

Plakatin hevur hingið í Føroyahúsinum eina tíð.

– Ein drongur, ið hevði sæð plaktina, kom til mín í Føroyahúsinum ein dagin. Hann spurdi; koma tit úr sjónvarpinum og heilt hertil?, smáflennir Angela.

– Vit fara at royna okkum við eini veruligari framførslu, sum vit kenna frá Angelu og Hannibal og so hava vit okkurt annað eisini, t.d. føroyskar sangir, sigur Angela, ið sigur, at áhugi er fyri teimum í Danmark og at heitt eisini hevur verið á tey um at vitja í Danmark við Fres, men hetta er nakað, ið tey mugu umhugsa.

Føroysk børn í Danmark fylgja eftir øllum at døma við í tí sama, sum børn í Føroyum, sigur Angela, ið eisini hugleiðir um teirra framførslur, at tær eru av slíkum slag, at tær røkka yvir mørk, so sum aldur og tungumál.

Um fleiri framførslur verða í Danmark við Angelu og Hannibal, er støða ikki tikin til enn.

formula.fo



miðlahúsið
í Vágsbotni

**Hvønn dag í mars mánaða verða Sudoku uppgávur at finna í Sosialinum.**

**Jú fleiri uppgávur, ið tú hevur loyst, tess størri møguleika hevur tú at vinna.**

**Sendið okkum loysnirnar innan 3. apríl kl. 10.00 og viðmerkið brævbjálvan "Sudoku".**

**Vinningurin er ein Fujitsu Siemens Amilo Pro V2035 fartelda frá Formula.fo, virði 7.995,– kr.**

**Fujitsu Siemens Amilo Pro V2035 hevur m.a.:**
· Intel Celeron M380 Processor · 1,6 GHz Celeron proccessor · 1 MB Cache · 512 MB DDR2 RAM PC533 · 60 GB S-ATA Harðdisk · DVD+/-RW DL Brennara · VIA N800 Grafikkkort upp til 64 MB · Ljóðkort & Stereo Hátalarar · 10/100 Mbit netkort · 4 x USB 2.0 · 15" WXGA TFT skíggja · Tráðleyst netkort GemTek 802.11 BG · 56K V.90 modem MDC1.5 · Windows XP Pro DK (MUI)

**Drigið verður fyrstu vikuna í apríl.**

**Fyri at vera við í kappingini, skulu allar uppgávurnar verða loystar**

## SUDOKU mars KAPPING

| | | | | | | | | |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| | 1 | | 6 | | 4 | | | 9 |
| 2 | | | 7 | | | 3 | | |
| 8 | 4 | | | 5 | | | 6 | |
| 4 | 6 | | | 1 | | 8 | 2 | |
| | | 7 | 4 | | 5 | 6 | | |
| | 9 | 8 | | 3 | | | 5 | 7 |
| | 8 | | | 7 | | | 3 | 6 |
| | | 1 | | | 2 | | | 5 |
| 5 | | | 3 | | 9 | | 4 | |

SERA LØTT

| | | | | | | | | |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 2 | 9 | 7 | | | | | 3 | 5 |
| | 1 | | | 2 | 6 | | | |
| | | | 5 | | | | | 9 |
| 9 | | | | 3 | | 7 | 4 | 1 |
| | | | | | | | | |
| 5 | 6 | 1 | | 8 | | | | 3 |
| 4 | | | | | 8 | | | |
| | | | 7 | 6 | | | 5 | |
| 1 | 7 | | | | | 8 | 6 | 4 |

LØTT

| | | | | | | | | |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| | 2 | | | | | | 7 | |
| | | 8 | 2 | | 5 | 6 | | |
| | | 1 | 3 | | 6 | 2 | | |
| 8 | | | | 1 | | | | 4 |
| | 9 | | | | | | 3 | |
| 3 | | | | 5 | | | | 2 |
| | | 7 | 1 | | 8 | 5 | | |
| | | 9 | 5 | | 2 | 4 | | |
| | 5 | | | | | | 8 | |

MIÐAL

| | | | | | | | | |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| | 3 | | 5 | | | 8 | | |
| | | | 6 | | 9 | | | |
| | | 6 | | 1 | 4 | | 7 | |
| | | 4 | | | | | 1 | 8 |
| | 7 | | | | | | 5 | |
| 9 | 8 | | | | | 6 | | |
| | 6 | | 2 | 4 | | 3 | | |
| | | | 9 | | 8 | | | |
| | | 9 | | | 6 | | 8 | |

TRUPUL

NAVN: ______________________ BÚSTAÐUR: ______________________

Sendið til: Sosialurin · Box 76 · 110 Tórshavn. Merkið brævbjálvan "Sudoku"

Sosialurin
Tórsgøta 1 · P.O. Boks 76 · FO-110 Tórshavn · Tel 34 18 00
Fax 34 18 01 · post@sosialurin.fo · www. sosialurin.fo